# Skutaramenn komnir til Keypmannahavnar

**Eftir 12 dagar á sjógvi og á landi eru skutaramennirnir Atli S. Petersen og Sveinur Høgnason komnir til Keypmannahavnar. Teir komu á midnátt mánakvøldið eftir eina trupla og møðsama ferð, har teir vóru nógv seinkaðir. Atli sigur, at teir eru vælnøgdir, men at jantelógin er alt ov sjónlig í Føroyum**

SKUTARAFERÐIN
*Hans Kárason Mikkelsen*



*Her standa teir báðir Sveinur Høgnason og Atli S. Petersen á turrum, nú teir komu til Danmarkar mánakvøldið á miðnátt*
*Mynd: Ekstra Bladet*

Fitt av føroyingum vóru samlaðir á Langelinie, tá teir báðir Atli og Sveinur eftir ætlan skuldu koma í havn. Millum fólkini varð familja hjá teimum báðum, umframt umboð fyri fjølmiðlarnar. Ekstra Bladet varð á staðnum, og tað vóru TV 2 og TvDanmark eisini.

– Meldingin varð mánadagin, at teir skuldu koma klokkan 15:00, og tá vóru fólk longu á bryggjuni, siga føroyingar, sum vóru hjástaddir. Men Atli og teir vóru seinkaðir, og tí broyttu teir komuna til klokkan 22:00 um kvøldið. Tá varð rættiliga fitt av fólki á staðnum, eini 40-50 fólk, har mesti parturin vóru føroyingar.

Og tað varð bíðað og bíðað, men har komu ongir menn. So lótu teir hoyra frá sær aftur, og varð tað ein meira álítandi fráboðan hesuferð, tá teir søgdu, at havnin skuldi verið rokkin umleið miðnátt.

### Løgdu ikki at á Langelinie

Tá klokkan varð farin av tólv, byrjaði onkur troyttur føroyingur so spakuliga at ragga sær til húsa, men løtu seinni frættist, at nú komu teir altso stunandi inneftir.

Men skutaramennirnir løgdu ikki at á Langelinie, tí tað læt seg ikki gera. Ístaðin fóru teir til Svanemøllen, har ein smábátahavn er. Har løgdu teir skutaran, og síðani gingu teir stutta teinin frá Svanemøllen til Langelinie, har Lítla Havfrúgvin bíðaði saman við øðrum góðum fólki.

Eini 30-40 fólk stóðu nú á bryggjuni, nakað minni enn fyrr á degnum, tí tað varð blivið so seint. Meginparturin av fólkinum vóru føroyingar, sum vóru komnir at fregnast, men onkrir danir vóru eisini at síggja.

Atli S. Petersen og Sveinur Høgnason siga við Sosialin, at tað hevur verið ein møðsamur og trupul túrur. Skutaratúruin vardi í 12 dagar, og vísti tað seg frá fyrsta degi, at hetta varð eitt trupult tiltak.

Fyrstu trupulleikarnir vóru sum kunnugt, at hol kom á dunkarnar, har menninir høvdu eyka brennievni. Síðani varð veðrið ikki heilt til vildar við høgari aldu og vindi. Brennievni bleiv eisini blandað við sjógvi, ið elvdi til motortrupulleikar. Og afturat øllum tí rendu teir á land.

### Siglingstíðin varð 10%

Men Atli og Høgni eru vælnøgdir við avrikið, og Atli sigur, at siglingstíðin varð ikki so galin: – Vit brúktu einar 30 tímar í siglingstíð, og málið varð 20 tímar, so tað er ok, sigur Atli S. Petersen. Tað vil altso siga, at teir á túrinum brúktu næstan 300 tímar á landi, og er siglingsparturin tí knapt 10% av øllum túrinum.

Men Atli og teir eru kortini væl nøgdir, og teir siga, at skutarin gekk illa móti endanum av túrinum, og at GPS'arin riggaði heldur ikki longur. Tískil máttu teir sigla upp á gamlan máta við vanligum kumpassi og korti, og bleiv tað sjálvandi nakað tíðarkrevjandi. Atli leggur eisini aftrat, at maskinan er í ringum standi, m.a. pumpuhúsið á skutaranum illa farið.

Spurdur, um tað ikki varð ábyrgdarleyst at sigla víðari undir slíkum umstøðum, sigur 31-ára gamli Atli, at trygdin varð allatíðina í hásæti við fylgissveina-telefon og regluligum sambandi við bjargingarmyndugleikarnar.

Til spurningin, um tað ikki varð strævið og óttafult fyri øll tey fólkini, sum vóru rundanum tiltakið, og sum stuðlaðu teirra ferð, sigur Atli, at tey skiltu okkara íblástur og vilja.

### Góð móttøka í Keypmannahavn

– Tað varð eitt sindur ymist, hvussu fólk tóku tað, tá vit komu til Keypmannahavnar, staðfestir Atli og sigur, at vinmennirnir góvu okkum herðaklapp. – Øðrvísi varð við familjuni, sum bara varð glað fyri, at tað varð yvirstaðið, sigur Atli, sum eisini er glaður fyri at síggja familju og vinir og kenningar aftur.

Sjampanju-gløsini vóru eisini tikin fram, tá teir báðir vóru komnir upp á turt. Men vit frætta úr Keypmannahavn, at ongir av sponsorunum hjá Atla og Sveini vóru at síggja við bryggjuna, har sjampanjan varð drukkin.

Men Atli sigur seg vera væl nøgdan við móttøkuna í Keypmannahavn, og hann sigur, at tað varð spell, at teir vóru so seinir. – Helst høvdu fleiri fólk verið at sæð, um vit komu fyrr upp á dagin, og um veðrið varð betri, sigur Atli.

### Beinleiðis í TV 2

Fjølmiðlarnir hildu seg tó ikki aftur, og vóru umboð fyri ein stóran part av fjølmiðlunum í Danmark til staðar. Atli sigur í hesum sambandi, at tað virkar, sum úlendingar hava haft størri áhuga í teirra ferð.

Tá vit spyrja Atla, um hann heldur, at føroysku fjølmiðlarnir hava verið órímiligir og ov kritiskir, tá teir hava umrøtt ferðina, sigur Atli, at fólk skulu hava loyvi at meina, hvat tey vilja. Men Atli sigur, at tey fólkini, sum hava tosað negativt um ferðina, eru ofta fólk í Føroyum, sum sita heima í stovuni, og sum ikki vitað tað stóra um umstøðurnar undir slíkum tiltøkum.

– Men hví gjørdu tit tað av fyrstan sinni, spyrja vit Atla, sum skal í TV 2 týskvøldið, har sjónvarpsstøðin sendir beinleiðis frá samrøðu við Atla og Svein.

– Vit gjørdu tað ikki fyri at fáa umrøðu í fjølmiðlunum ella fyri at blíva kendir. Hetta er mest av øllum fyri okkum sjálvar, soleiðis at vit á gamalsaldrinum kunnu sita og minnast aftur á hin skutaratúrin til Danmarkar, sigur Atli.

### Ov nógv jantelóg í Føroyum

Atli veit ikki, hvussu eftirtíðin fer at meta hetta, men hann sigur, at nú hevur hann búð í Danmark so leingi, og heldur hann, at jantelógin ger seg nógv meira galdandi í Føroyum enn í Danmark. – Man skal ikki halda seg vera nakað í Føroyum, sigur Atli, sum vónar, at hann kann fáa eitt vanligt og friðarligt lív heima í Føroyum.

At enda spyrja vit Atla, um hann hevur nakað í hettuni í framtíðini, men tað vil hann hvørki vátta ella avsanna. – Latum okkum nú bara koma heim, og so fáa vit at síggja, sigur Atli, sum saman við Sveina brúkti 12 dagar á skutara til Danmarkar, nakrar vikur minni enn Ove í føroyskum báti.



UTTAN ÚR HEIMI

# Havbotnurin oyðin í trý ár



*Níggju mánaðir eftir at tangaskipið »Prestige« sakk úti fyri sponsku strondini arbeiða 4.000 fólk framvegis við at taka olju upp*

**Tey fyrstu trý árini verður einki lív á havbotninum, har tangaskipið »Prestige« sakk seinasta heyst, og tað fara at ganga tíggju ár, áðrenn viðurskiftini koma aftur í rættlag**

UMHVØRVISDÁLKING
*Árni Joensen*

Seinastu tíðina hava 40 serfrøðingar frá trimum lærdum háskúlum í Spania kannað viðurskiftini á leiðini, har tangaskipið »Prestige« fór av um tvøran og sakk tann 13. november í fjør.

Og niðurstøðan er skelkandi. Serfrøðingarnir skriva í einari frágreiðing, sum er latin almennu myndugleikunum, at tað fer at taka trý ár, áðrenn lív kemur aftur í tann dálkaða havbotnin, og at tað fara at ganga tíggju ár, áðrenn viðurskiftini verða, sum tey vóru undan vanlukkuni.

Sponsku serfrøðingarnir hava gjørt sínar metingar út frá royndunum aftan á vanlukkuna við tangaskipinum »Mar Ego« í 1992.

Í frágreiðingini stendur, at 25.000 deyðir fuglar vórðu funnir aftan á vanlukkuna seinasta heyst, men serfrøðingarnir halda, at millum 250.000 og 300.000 sjófuglar doyðu av oljudálkingini. Er hendan metingin bein, er hetta tann ringasta vanlukkan, sum nakrantíð hevur rakt fuglalívið í Evropa, skrivar blaðið El Pais.

»Prestige« sakk tann 13. november, men framvegis arbeiða 4.000 fólk við at taka olju upp á sponsku norðurstrondini. Sambært El Pais vórðu meiri enn 2.800 tons tikin upp tær báðar fyrstu vikurnar í hesum mánaðinum, og dagliga rekur olja inn á millum 30 og 60 strendur, skrivar blaðið.

# Funnu nýføðing í vápnakassa

**Tveir bretskir hermenn fingu ein rættiligan hvøkk, tá teir nú um dagarnar komu fram á ein vápnakassa í suðuriraksha býnum Basra**

IRAK
*Árni Joensen*

Damien Kenny og Jonathan Hunt vóru á einari vanligari eftirlitsferð í Basra har suðuri í Irak nú um dagarnar, tá teir komu fram á ein vápnakassa.

Í kassanum, sum var ein metur til longdar, funnu hermenninir maskinbyrsur, lóður, knívar og ein granatvarpara umframt eina nýfødda smágentu. Hermenninir varnaðust, at gentan dró ikki andan, men tað eydnaðist teimum at fáa lív í hana aftur, og hon er nú latin mammuni. Hví gentan, sum hevur fingið navnið Rose, var komin í vápnakassan at liggja, er ikki greitt.

Damien Kenny og Jonathan Hunt hava fingið róssandi orð frá sínum herleiðarum í Basra. Paul Davis, majorur, sigur, at tilburðurin vísir, hvussu dugnaligir teir ensku hermenninir eru.



*Tann tveir dagar gamla Rose, sum varð funnin í vápnakassanum*

## Hollur granni

Nú verður kannað, um ísraelski forsætisráðharrin, Ariel Sharon, hevur gjørt seg sekan í korrupsjón.

Vinnublaðið Globe hevur avdúkað, at forsætisráðharrin hjálpti tveimum av sínum grannum at fáa serliga stórt endurgjald frá tí almenna, sum skuldi ognartaka nakað av jørð teirra til vegagerð. Sambært blaðnum fingu teir báðir grannarnir 110.000 dollarar meiri í endurgjaldi fyri jørðina, enn teir høvdu fingið undir vanligum umstøðum.

Skrivstovan hjá Sharon hevur váttað, at forsætisráðharrin var millummaður millum grannarnar og samferðslumálaráðið, men hon avsannar, at forsætisráðharrin misnýtti sítt vald fyri at útvega grannunum serliga stórt endurgjald. Kortini hevur stjórnaradvokaturin gjørt av, at málið skal kannast.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Sharon verður drigin upp í mál um korrupsjón. Løgreglan hevur meiri enn eina ferð kannað gitingar um, at Sharon og synir hansara hava verið uppi í líknandi málum.

## Offur fáa endurgjald

Forsetin í Kili, Ricardo Lagos, hevur biðið tjóðartingið um 220 milliónir krónur í endurgjaldi til avvarandi hjá fólki, sum vórðu myrd undir hernaðarstýrinum hjá Augusto Pinochet.

Keldur í Kili siga, at sambært umsóknini frá forsetanum fáa skyldfólk hjá umleið 4.000 familjur endurgjald. Nicolas Eyzaguirre, fíggjarmálaráðharri, sigur, at í fyrsta umfari snýr tað seg um tær mest ræðuligu gerðirnar hjá hernaðarstýrinum.

Kunngerðin um endurgjald kom góðar tríggjar vikur undan 30 ára degnum fyri statskvettið tann 11. september í 1973, tá herurin koyrdi Salvador Allende, forseta frá. Hildið verður, at hernaðarstjórnin beindi fyri umleið 3.000 politiskum andstøðingum tey árini, stýrið sat við valdið.

## Kópur leyp á

Tann 21 ára gamli onglendingurin Levi Clarke mátti beinleiðis á sjúkrahús, eftir at ein kópur leyp á hann, tá hann var og svam uttan fyri Leigh-on-Sea í Essex nú um dagarnar.

Saman við fýra vinmonnum var David Clarke farin at svimja. Brádliga sóu teir nakrar kópar, og David Clarke, sum ongantíð hevði sæð ein kóp áður, svam yvir ímóti teimum. Men knappliga sóu vinmenninir, at ein av kópunum togaði Levi Clarke niður í sjógvin. Teir skundaðu sær yvir til hansara, og tað eydnaðist teimum at fáa kópin at sleppa takinum.

Tann 21 ári gamli svimjarin varð alt fyri eitt fluttur á sjúkrahús, og har kundu læknarnir staðfesta, at hann hevði brotið beinið í trimum støðum. Sjálvur sigur Levi Clarke, at hann hevur fingið ein rættiligan hvøkk, og at hann fer at ansa betur eftir, næstu ferð hann kemur fram á ein kóp.

## Ágangandi kvinnur

Tann vanliga uppfatanin millum fólk er, at menn eru meiri kynsliga ágangandi enn kvinnur, men hetta er sambært einari nýggjari týskari kanning ikki rætt.

Lærdi háskúlin í Potsdam hevur spurt 400 menn í aldrinum 15 til 25 ár, og fjórði hvør teirra sigur seg hava verið fyri kynsligum ágangi frá kvinnum. Av teimum, sum eru millum 22 og 25 ár, sigur annar hvør, at teir hava kent seg noyddar at hava havt kynsliga samveru við kvinnum.

Norski sexologurin Kjell-Olav Svendsen sigur við Dagsavisen, at kynsligur ágangur er álvarssamur, sama hvørjum kyni hann kemur frá. Hann sigur, at kynsligur ágangur frá kvinnum kann fáa óhepnar avleiðingar fyri teir menninar, sum eru fyri ágangi, og hann leggur afturat, at tað er ein myta, at menn altíð eru til dystin fús.